


Bøkjarin:

# Sonurin fekk heiðursløn uppkallað eftir seg



ÓLI JACOBSEN
*olij@sosialurin.fo*

**Øll hava hoyrt um Mads A. Jacobsen. Um ikki annað so fyri ta heiðursløn, sum ber hansara heiti. Nógv hava eisini hoyrt um Bøkjaran, Jacob Jacobsen. Men neyvan nógv vita nakað serligt um hann**

***Dimmalætting skrivaði hesi minningarorð um Bøkjaran:***

Bøkjarin var eitt reystmenni, hugagóður, íðin og arbeiðsamur sum fáur. Tað er ikki meira enn o.u. 5 ár síðani, hann helt uppat at arbeiða í Vágsbotni. Hann var tá nærum 80 ár og hevði arbeitt í Vágsbotni í gott og væl 50 ár – eitt sjáldsamt dømi um stóran trúskap. Hetta var ein langur arbeiðsdagur, og hann hevur óivað mangan verið trupul og strangur. Men bøkjarin var ikki av teimum, ið stúrdu og føldu arbeiðið sum nakað, ein bert hevur plikt at gera. Hann átti ta góðu gávu at kunna gleða seg við arbeiði, og hann spardi allarminst seg sjálvan, men gekk á odda, har mest umráddi, og hvar tey tungastu tøkini skuldi takast.

Jacob Jacobsen var føddur í 1836 í Havn. Foreldur hansara vóru bókhaldari við kongiliga handilin Christian Jacobsen á Húsum og Maria Kristiansdóttir undir Skarði heima á Sandi. Jacob Jacobsen fór á ungum aldri til Keypmannahavnar í bøkjaralæru. Hann stóð fimm ár í læru og arbeiddi síðan um 7 ár hjá Ørum Wulf & Co, sum um hetta mundi hevði handil við Ísland. Um sumrini arbeiddi hann í Íslandi og um vetrarnar í Keypmannahavn. Í teirri tíðini búði einans maður í Seyðisfirði, og tað var sýslumaðurin.

Bøkjarin hevði frálíka gott minni og var sera tíðindafróður maður. Honum dámdi væl at siga frá gomlum døgum, og tey ið vitjaðu hann, og tað vóru ikki fá, hava havt manga hugnaliga løtu inni har.

Eftir ein langan og strævnan arbeiðsdag er hann farin heim til ta stóru hvíldina.

Kona bøkjaran var Elsebeth Djonesen uttan av Heyggi á Velbastað.

**Caroline Heinesen, mamma William, skrivar um húsini hjá bøkjaranum:**

Bødker Jacobsens hjem lå ved siden af bedstefars hus og var som et andet hjem for mig. Hvor var de dog prægtige mennesker og gjorde alt for deres børn og børnenes venner. Den ældste datter Marie ( gift med blikkenslager Ludvig Poulsen) og jeg var barndomsveninder, og jeg var hver dag oppe hos hende eller hun hos mig. Bødkerens moder boede der dengang og sad gerne ved ovnen og vuggede børnene, og imens fortalte hun os børn sagn og historier, også om Brillemanden og om jøden, der brækkede benet ovre i Kák. Deroppe fik vi også lov til at danse. Vi var mange, da alle de tre ældste døtre havde deres faste veninder.

Selvom fru Jacobsen havde nok at gøre, så fik vi lov til at tumle os så galt vi ville. Omma, som vi kaldte hende, var også tålmodig overfor os. Så var det ofte, når bødkeren kom hjem om aftenen, at han dansede med os. Han var en rask og livlig mand dengang. Det var en stor husstand, ni børn og bødkerens søster Bette Jacobsen boede der. Hun var lærerinde i håndgerningsskolen, og så var der altid fremmede, som kom og gik, ofte var de flere dage ad gangen. Når så de tre (døturnar) Maria, Sunniva og Sanna havde fødselsdag, var der ordentlig fest med chokolade og kager. En tid boede fru Jacobsens forældre også deroppe. Faderen var en lille spinkel mand, men konen var tyk, rød og robust, jeg kendte hende fra Velbastad. Marie og jeg var af og til ovre og besøge hende, hun var så gæstfri og dækkede op med al god færøsk kost. Hun havde en stor blåmalet dragkiste med mange skuffer i, og der havde hun smør og ost og andre ting. Det undrede mig, at hum gemte det i skuffen, men hun mente vel, at det stod sikrest der. En tid boede også Ellen der. Hun var en søster til bødkeren, men hun var vist næsten en plage for huset, da hun var så kritisk og hidsig, men hun havde vist et udmærket hoved. Hun var vældig slagfærdig, men hun var vist meget vanskelig at omgås for fru Jacobsen. Men Ellen kunne være meget elskværdig, imod mig var hun så rar. Hun kendte mine forældre så godt nede fra bedstefar (gamla Restorff). Også bødker Jacobsen og min fader holdt så meget af hinanden og havde været ungdomsvenner. Dengang et af de yngre børn blev født, jeg synes at det var bibliotekaren Mads, blev Marie og jeg sendt ud til Ellen faster for at fortælle hende det. Rimeligvis havde hun travlt, hun havde en café, der hvor gamle Danmark nu ligger. Vi kom så glade og fortalte, at der var kommet en lille broder. Hun svarede: "Hvad fanden rager det mig". Vi blev så slukørede, men vi fortalte naturligvis ikke fru Jacobsen, hvad hun havde svaret os. Hun var et usædvanligt dygtigt og flittigt menneske. Hun var også som alle de søskende et ualmindelig reelt og hæderligt menneske.

Onnur børn hjá bøkjaranum vóru Maria Poulsen, Hjalmar Jacobsen, bókhandlari, Sanna, kona Símun av Skarði, Kristian (Ki), Sunneva g. Mortensen á Tvøroyri, Sigrid, doyði ung, Johanna g. Hjelm í Vági og Zacharias



JACOB JACOBSEN
Á HÚSUM Í HAVN
FØDDUR 1.
SEPTEMBER 1836
DEYÐUR 27.
SEPTEMBER 1921

ELSEBETH JACOBSEN
F. DJONESEN
FØDD 16. OKTOBER
1848
DEYÐ 10. AUGUST
1938



*Bøkjarin og Elsebeth*



*Jógvan hjá Ki eigur útgerðina sum abbi og pápi hansara áttu at gera tunnur við. Tað, sum sær út sum ein tunna niðast á myndini, er boya, sum varð gjørd til Tórshavnar havn*



*Sonurin Kristian, nevndur Ki, gjørdist eisini bøkjari. Lærdi í Danmark og kom heim í 1901. Árini 1908-10 var hann 17 mánaðir við einum norskum hvalaveiðuskipi í Suðuríshavinum sum bøkjari*

**Næstu ferð:**
Í komandi part fara vit at umrøða M. C. Restorff (1907-1925). Hann var sonur Frants og átti fyrsta radio í Føroyum, men tað varð bannað honum at brúka tað!